Undir sjóvarmálan 24 tímar um samdøgrið

Thorben til arbeiðis á Lambavík. Arbeiðsøkið fevnir annars um alla Eysturoynna og Vágoynna við

Um klokkan er 3 á nátt ella 15 um dagin, so er kavarin Thorben Gaardbo av Toftum til reiðar at geva útróðrarmonnum sína hjálpandi hond

FISKIVINNA
Snorri Brend

Útróðrarmenn kenna til trupulleikan: Fast er um skrúvuna, og ein sleppur ikki til útróðrar, ella má bróta túrin av.

Umborð verður sjálvandi roynt at fáa trolið ella endan av skrúvuni, men tað er langt frá altið at tað ber til. Tað er ikki so lætt at arbeiða undir sjóvarmálanum, meðan ein sjálvur stendur á turrum.

Ein av teimum, sum hevur sæð møguleikarnar í hesum, er toftamaðurin Thorben Gaardbo, sum saman við konu sínari, Renata eigur og rekur "TR-Dive" - T fyri Thorben og R fyri Renata.

Við fyritøku sínari býður hann sær at loysa henda trupulleikan - og aðrar við! - fyri útróðrarmenn, alifólk og onnur.

Tvørtur um sund

Hóast TR-Dive er nógv eftirspurt, so gav Thorben sær kortini tíð til at luttaka á einum barnatiltaki í missiónshúsinum á Toftum seinasta leygardag.

Tá eg biði Thorben um at lýsa virksemið hjá fyritøkuni, so ger hann tað við fáum, men kortini beinraknum orðum:

- Okkara høvuðsuppgáva er at veita eina tænastu undir sjóvarmálanum 24 tímar um samdøgrið til allan tann føroyska fiskiflotan, har tað er landfast.

Høvuðsstøðin hjá TR-Dive er á Toftum, men virksemið fevnir um mong onnur pláss í Føroyum. Heilt av Toftum, til Runavíkar og Leirvíkar, og mín sann um ikki Thorben hevur verið og kavað á Lambavík eisini. Tænastan røkkur í roynd og veru til tey støðini, har koyrast kann til við útgerðini, ið nýtt verður.

Arbeitt hevur serliga verið í sjálvari Eysturoynni, men við tunlinum undir Vestmannasund skaptust góðir møguleikar fyri at víðka virksemið vestureftir. Og í dag er Vágoyggin eisini ein partur av arbeiðsøkinum hjá TR-Dive.

Lekar og kræklingur

Tá ein skal kunna ferðast til allar havnir á hesum oyggjum, er sjálvandi neyðugt at hava ein góðan bil til flutningin.

Men bilurin tænir eisini til annað, nevniliga sum reklama fyri virkseminum. Og hesin stóri blái bilurin ber tí eisini tey boðini til báta- og skipaeigarar, at eru trupulleikar undir sjóvarmálanum, so er bara at venda sær til TR-Dive.

Sagt verður her frá, at hevur ein t.d. fingið um skrúvuna, so kann fyritøkan á Toftum skjótt og lætt taka sær av tí. Og so er líkamikið um kl. er 03 ella 15!

Hetta er eisini tað arbeiðið, sum Thorben í størstan mun ger, tá hann verður boðsendur. Á ein einfaldan og skjótt hátt kann hann loysa ein trupulleika, ið mangan man hava verið atvold til stórt høvuðbrýggj hjá skipa- og bátaeigarum kring landið.

Tað kann eisini koma fyri at skip brádliga fara at leka, meðan tey liggja við bryggju. So er bara eitt at gera - at boðsenda Thorbeni, sum við útgerð sínari fær sett ein propp í holið, soleiðis at lekin kann steðgast sum skjótast.

Ein uppgáva av heilt øðrum slagi er, tá kræklingur er komin í rørini, so proppur kemur í. Her kann so Thorben á effektivan hátt reinsa rørini innanfyri fyri kræklingin.

Bæði til arbeiðis

Tað eru sum nevnt hjúnini Thorben og Renata sum eiga og reka TR-Dive. Og tey eru tí eisini saman um at loysa mangar av uppgávunum.

Har tað er neyðugt verður tað gjørt á tann hátt, at Thorben er hann ið kavar, meðan Renata hevur eftirlit við at alt gongur rætt fyri seg uppi á sjálvari bryggjuni ella umborð.

– Tað skuldi jú treyðugt hent, at menn fara umborð á skipið, og starta motorin, meðan eg eri í ferð við at skera trolið leyst, sum teir hava fingið um skrúvuna!

– At vit hava skipað arbeiðið soleiðis ger at tað er ein tryggleiki í tí, sigur Thorben, sum hevur verið í hesi vinnuni síðani 1989. Arbeiðið hevur síðani tá bara vundið uppá seg, - so nógv, at tey bæði nú kunnu liva av tí.

Alingin hevur eisini givið Thorben nakað av arbeiði, men hetta hevur fyri tað mesta verið, tá tað ikki hevur ligið fyri hjá øðrum kavarum.

– Tað er kortini mest línubátarnir, sum hava havt brúk fyri okkum. Onkrir trolarar, men mest línubátarnir.

Tvær uppgávur bíða

TR-Dive setur eina æru í at veita 24 tíma tænastu, so tað er kanska ikki altíð so lætt at planleggja nakað frammanundan.

Henda leygardagin eg hitti Thorben í missiónshúsinum á Toftum hevði hann dagin fyri verið hjá einum báti, sum hevði fingið um skrúvuna. Og tá barnatiltakið í missiónshúsinum var at enda komin lá næsta uppgávan fyri framman – ella næstu uppgávurnar: Ein í Leirvík og ein í Runavík.

Hóast nógv skip og bátar eru í økinum, so er ikki altið at nøkur uppgáva liggur og bíðar. Av og á hava tey havt onkrar fylgjandi frídagar, men so kann tað meiri enn so tørna fyri aðrar dagar – onkran dagin 5 uppgávur.

Ein av fyrimunum hjá Thorbeni er at hann kennir so ótrúliga nógvar av bátunum og bátaeigarunum, frá tíð síni sum "hivari" hjá Fiskamarknaðinum á Toftum.

– Nú vita teir, at eg kann veita teimum hesa tænastuna. Og fáa teir um skrúvuna, so ringja teir bara til mín, og so ordni eg tað, sigur Thorben.

Tá talan kemur inn á ætlanir í framtíðini, so sigur hann, at tey í stóran mun ætla at halda somu kós sum higartil, at kunna veita kundanum ein góða tænastu í 24 tímar um samdøgrið - altið!